STARVSLÝSING

# Elektrikari

Søkt verður eftir dugnaligum og álítandi elektrikara til skervverkini hjá okkum kring landið og asfaltverkið í Hundsarabotni.

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um viðlíkahald og umvæling av el-útbúnaði á skervverkunum sum eru í Hundsarabotni, Hústoft, Sandoy og Porkeri og asfaltverkinum í Hundsarabotni.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava útbúgving sum elektrikari ella aðra viðkomandi útbúgving.

**Setanartreytir**
Løn og setanartreytir annars eru sambært sáttmála ímillum Føroya Handverkarafelag og Landsfelag Handverkaranna og Fíggjarmálaráðið. Starvið er fastlønt.

**Umsóknir**
Umsóknir verða at senda til:

Landsverk,
Postsmoga 78,
FO-110 Tórshavn,

og skulu vera skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 15. mars, 2007. Merk umsóknina „Umsókn elektrikari" og viðmerk í umsókníni, hvar tú hevur sæð starvslýsingina. Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Torkil Olsen, deildarleiðara, á tlf. 540 841 ella umvegis teldupost to@lv.fo.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*

*Landsverk er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum, og hevur um hendi vega-, byggi og havna myndugleikauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og tyrlupallar.*

# Import søkir skrivstovulærling

Import er ein nútímans fyritøka ið er í rúkandi framgongd. Vit hava verið á marknaðinum í Føroyum í trý ár og vit eru just byrjaði á marknaðinum í Íslandi. Vit eru í løtuni 3 fólk í føstum starvi og 2 partíðar starvsfólk.

Umframt at selja vindeygu, hurðar og klædning í Føroyum selja vit eisini vindeygu og hurðar í Íslandi.
Vit kunnu bjóða rætta umsøkjaranum eitt spennandi starv á einum mennandi altjóða arbeiðsplássi, har tú sleppur at seta tín persónliga dám á fyritøkuna. Vit kunnu eisini lova tær, at ongin arbeiðsdagur er eins.

***Vit vænta at tú er:***
- Opin
- Útadvend/ur
- Vinarlig/ur
- Ágrýtin
- Røkin

Metir tú at tú kann liva upp til hesi krøv, kunnu vit umframt eina útbúgving sum skrivstovufólk bjóða tær at verða ein partur av einum toymi, ið dagliga samskiftir við stóran part av heiminum.
Tað krevst eisini, at tú ikki er bangin fyri sera fjøltáttaðum uppgávum og avbjóðingum.

Ábyrgd og avgerðir mynda stórar partar av starvinum.

Umsóknir skulu sendast til:
Postboks 3070 • FO 110 Tórshavn
Far tlf 565 565 • Fax (+298) 321 421
e-mail import@import.fo

Hava tit spurningar eru tit vælkomin at ringja ella skriva.

import.fo
Tlf. 565 565

EL-SERVICE

FO-480 Skála · Faroe Islands · www.el-service.fo
Tlf. 47 19 00 · Fax. 47 19 01 · el-service@el-service.fo

# Elektrikkarar

Vit sóknast eftir elektrikkarum til arbeiði í Føroyum, sum kunnu byrja skjótast gjørligt.

**Arbeiðsuppgávurnar fevna m.a. um:**
- el-innleggingar umborð á skipum
- el-innleggingar í bygningar á landi
- talvur
- stýringar
- o.a.

**Vit vænta at tú hevur:**
- úbúgvin sum elektrikkari
- evni at arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevni

Tú kann rokna við at skula arbeiða uttanlands í styttri tíðarskeið.

Løn sambært avtalu.

Áhugaði kunnu venda seg til El-Service á telefon 47 19 00.

Á El-Service arbeiða uml. 40 fólk, tey flestu hava el- og maskinútbúgving. Vit arbeiða við framleiðslu, innstallatión, eldsløkkiútgerð og offshore.

Størsti parturin av okkara veitanum og framleiðslu fer til útflutnings.

Vit leggja stóran dent á góðsku og eru ISO-9001 góðkent.



# ARBEIÐSFÓLK/HANDVERKARI M/K

**Vit sóknast eftir arbeiðsfólki ella handverkara – manni sum kvinnu – at byrja á snikkaravirkinum í Vatnsoyrum skjótast til ber.**

**Vit bjóða:**
- eitt spennandi starv
- tryggar arbeiðsumstøður
- gott arbeiðsumhvørvi

**Løn:**
- sambært avtalu

**Vit vænta av tær:**
- at tú ert ágrýtin og vandin
- at tú arbeiðir sjálvstøðugt og hevur góð samstarvsevni
- at tú ert fyrikomandi, og sýnir støðufesti

Meiri fæst at vita við at venda sær til Fróða Hansen á 22 36 56 ella á frodi@hdygd.fo

HDYGD

í Geilini 2 | FO-385 Vatnsoyrar | Tel.: +298 332177 | www.hdygd.fo | post@hdygd.fo

*Vatnsoyra Snikkaravirki pf. og Føroya Gluggi pf. eru systurfeløg og hava felags navn og umsiting. Vit smíða vindeygu og hurðar úr træ, træ/alu og plasti. Í løtuni eru 24 starvsfólk, harav 8 á sjálvum virkinum.*

REPROZ